# NØVN

SAMBAND
MAGNUS GUNNARSSON
MAGGI@SOSIALURIN.FO
TLF 341800 FAX 341801

*Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.*

## Lars Løkke 45 ár

Í dag 15. mai fyllir danski statministarin Lars Løkke Rasmussen 45 ár.

Lars Løkke varð føddur í Vejle 15. mai 1964, sonur Jeppe og Lise Løkke Rasmussen, navnið Løkke er familjunavn hjá mammuni.

Lars fekk studentsprógv í 1983. Hann hevur frá ungum árum verið virkin politiskt og var formaður fyri Venstres Ungdom frá 1986 til 1989.

Frá 1990 til 1995 arbeiddi hann sum freelance konsulentur, og í 1992 tók hann tók prógv sum Cand.jur. á Københavns Universitet.

Hann var limur í høvuðsstýrinum hjá Venstre frá 1986-90 og aftur síðan 1998, tá hann gjørdist formaður í flokkinum. Hann var amtsborgmeistari í Frederiksborg Amt frá 1998-2001.

Tann 5. april í ár tók Lars Løkke við sum statsministari í Danmark, eftir Anders Fogh Rasmussen sum tók við starvinum sum aðalskrivari í Nato.

Lars er giftur Sólrun Jákupsdóttir Rasmussen, sum er úr Havn, dóttir Bergljót av Skarði úr Havn og Jákup Petersen úr Klaksvík. Sólrun og Lars eiga børnini: Bergur, Lisa og Símun.



†

### Andlát og jarðarferðir

**Jógvan við Á**, ættaður av Velbastað, búsitandi Oman Hoydalar, andaðist mikudagin, 80 ára gamal. Jarðarferðin verður úr Kirkjubøar Kirkju leygardagin kl. 12.00.

**Ása Hinson**, fødd Skrøder, ættað úr Havn, búsitandi í Humnanby í Onglandi, andaðist 11. mai, 73 ára gomul.

**Meinhard Forná úr Kvívík** andaðist á Landssjúkrahúsinum 12. mai, 82 ára gamal. Farið verður úr kapellinum fríggjadagin kl. 18 í Kvívíkar kirkju. Jarðarferðin verður úr Kvívíkar kirkju leygardagin kl. 14. Sungið verður úr sálmabókini.

### Prógv

10.apríl 2009 tók Svend Hansen, Klaksvík prógv sum tyrlupilot á Bristow Academy, Florida USA.

## Skeið í evangelisering og sálarrøkt

TÍÐINDASKRIV

Skeið undir heitinum „Each One Reach One - Each One Teach One „ verður í Zarepta vikuskiftið Kristi himmalferðardag. Endamálið við skeiðnum er at eggja og búgva út trúgvandi til persónliga evangelisering og til at taka sær av nýfrelstum og læra tey - ein og ein.

Undirvísarar verða Thom Cunningham, trúboðari í NTM og kona hansara Carolyn. Tey hava hildið hetta skeiðið í nógvum londum við góðum úrslitum. Thom Cunningham brennir fyri at eggja øðrum trúgvandi til persónliga evangelisering, og hetta endurspeglast í undirvísingini, sum verður sera viðkomandi, spennandi og løtt at fylgja.



*Thom Cunningham*

Skeiðið vendir sær sostatt til teirra, sum fegin vilja luta gleðiboðskapin í dagliga lívi og virki sínum. Skeiðið bæði eggjar til og vísir á, hvussu hetta kann gerast

Undirvísararnir eru trúboðarar í New Tribes Mission. Tey hava drúgvar royndir sum trúboðarar m.a. í Eysturríki, Onglandi, Skotlandi og USA.

Umframt at kunna um tørvin ímillum ónádd fólkasløg, so er hjartamál teirra at eggja øðrum trúgvandi at evangelisera í nærumhvørvinum - ein vinnur ein - ein lærir ein - .

Skeiðið byrjar mikukvøldið 20. mai kl. 18.00 við náttturða og endar við døgverða sunnudagin 24. mai. Undirvísingin verður á enskum. Aldursmark 18 ár og eldri. Kostnaður 650 krónur fyri hvønn. Tilmelding á telefon 32 19 19 eftir arbeiðstíð ella send teldupost til: office@ntm.fo.

## Tøkk



Hjartaliga takka vit øllum,sum á ymiskan hátt sýndu samkenslu, tá kæra kona, mamma, omma og dóttur

**Jóhanna Dorita Midjord (Dua)**

doyði og varð jarðað.

Takk til Bergur Debes Joensen, prest, fyri vitjanir og góð og troystarrík orð í kapellinum og kirkju. Takk til berarar, sangarar, kirkjutænarar og gravarar.
Takk til heimasjúkrasystrar, sum vóru um hana í heiminum og starvsfólkið á Landssjúkrahúsinum fyri umsorgan.
Takk fyri blómur, kransar og gávur til krabbameinsfelagið.
Tøkk til starvsfelagar á G4, tykkum sum bakaðu og hjálpti til við ervið saman við avvarandi.
Tøkk til tykkum mongu, ið fylgdu Due til hennara seinasta hvíldarstað her á fold.

*Familjunnar vegna*

**Egin, Høgni, Simona, Durita og Simona (eldra)**

## Tøkk

Eg takki øllum tykkum mongu, sum mintust til mín 80 ára føðingardag 25. apríl.
Takk til tykkum, sum komu at heilsa uppá meg og tit, sum ringdu til mín.
Ein serlig tøkk til døturnar og ommubørnini, sum hjálptu so væl til, so alt gekk uppá tað allarbesta.
Hjartans tøkk øll somul.
Eg heilsi tykkum við Sálma 25,14.

**Apolonia Johannesen, Hvannasund**

## Tøkk

Hjartaliga takka vit øllum fyri sýnda samkenslu, tá okkara góði pápi, verfaðir, abbi og langabbi

**Magnus Hamrá**

andaðist og varð jarðaður.
Tøkk til G4 á Landssjúkrahúsinum, heimahjálparar fyri góða røkt, tøkk til Gudrun fyri dagliga umsorgan.
Tøkk fyri blómur og kransar.
Tøkk til Theodor E. D. Olsen fyri vøkur minningarorð.
Tøkk til sangarar og til øll tykkum, sum hjálptu til við jarðarferðina, ervi og sum fylgdu honum til hansara seinasta hvíldarstað.

*Familjunnar vegna*

**Marita, Annika og Hannemi**